## DAGSINS MEINING

# Vís nú samráðingarevni!

Fryktast kann fyri, at nú verður aftur rok um orðadefinitiónir. Høgni Hoydal skal niður at samráðast við danska løgmálaráðharran um yvirtøku av eitt nú løgregluni. Lat tað fara, at man als ikki hevur gjøgnumhugsað tað praktiska í hesum, men ikki kann sigast, at man frá føroyskari síðu hevur viljað ført ein konstruktivan dialog á økinum. Politistafelagið er ímóti, at løgreglan skal yvirtakast, og er hetta ein álvarsspurningur, óansæð um man er samdur ella ei.

Hvat vil Høgni Hoydal fáa burturúr hesum samráðingum? Vil hann koma á mál, ella skal øsingin uppundir val skapast við hesum? Ikki kann sigast at semingsevnini hava verið góð í føroyskum politikki, og ilt er at síggja, at Høgni Hoydal skal verða ein størri diplomatur uttanfyri landoddarnar, enn hann er í Føroyum. Ein kann enntá frykta fyri tí øvugta, tá man eygleiðir tað orðklúgvarí, ið skuldi eitast at slíta fullveldissamráðingarnar við donsku stjórnina, hóast øll vita, at tað vóru pengarnir, ið tað snúði seg um.

Endar ferðin hjá Høgna Hoydal aftur í rok og brigsli um, at eingin annar dugir fólkarætt og altjóða mannagongdir enn føroyska tjóðveldisleiðslan, so var ferðin betur ógjørd. Ikki høvdu vit væntað at skullað sagt hetta, men tað tykist sum um, at sjálvt fólkafloksландstýrismenn hava betri evni, at fremja yvirtøkur á sínum málsøkjum, og tað sigur ikki so lítið!

Gamaní leggja teir ikki so stóra vekt á tey uniformeraðu økini, sum Tjóðveldisflokkurin ger, men tung mál fyri eina sjóvinnutjóð sosum Skipasýnið tykjast koma undir land.

Eitt annað endamál við ferð Høgna Hoydals kann vera at cementera mytuna um danska ómøguligheit. Mytan um, at velja føroyingar eina loysn innanfyri ríkisfleagsskapin og grundlógina, so frásiga føroyingar sær allan sjálvsavgerðarrætt í allar ævir, tykist verða sera seiglívað. Henda myta, sum einans er grundað í undirbrotligheit vegna okkara eftirkomarar og ósmædnari yvirvurdering av teimum, ið ráða í hesum valskeiðnum, eigur at verða manað í jørðina einaferð med alla. Tað verður hon, tá nú vónandi ein loysn snikkað eftir fólksins vilja verður førd í lívið eftir komandi val.

Nógv kann oyðileggjast áðrenn tað við at skapa rok áðrenn valið. Høgni Hoydal hevur í dag møguleikan at gera hesa grein til skammar. Tað skal verða okkara vón, at hann ger tað við at fáa eitt gott hóvligt samráðingarúrslit uttan rok og briksl, tá hann nú tosar við Frank Jensen.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Yvirgangur og yvirvald – yvirhøvur

**Landsnevnd Unga Tjóðveldisins**
*Jóannes Vitalis, Jógvan Jacobsen, Jógvan Philbrow, Katrin Bech og Rúni Nielsen.*


*Jóannes Vitalis*


*Jógvan Jacobsen*


*Jógvan Philbrow*


*Katrin Bech*


*Rúni Nielsen*

Unga Tjóðveldið fordømir álopini á USA. Hesi kensluleysu álop á vanlig fólk vísa heilt greitt, hvussu vandamikil skipaður yvirgangur er. Uttan iva hava hesi álop broytt valdsjavnvágina í heiminum. Í øllum londum við veruligum fólkaræði verða tílík mál tikin við størsta álvara. Tey verða beinanvegin viðgjørd á hægsta stigi, og síðan er vanligt, at lívligt alment kjak er um, hvussu rættast er at bera seg at. Men um hugt verður at, hvussu hesi mál verða viðgjørd í heimastýrinum, sæst týðiliga, at veruligt fólkaræði ikki virkar í Føroyum: okkara rødd verður ongastaðni hoyrd ella vird, tjóðin hevur eingi rættindi og eingin almenn viðgerð er — yvirhøvur. Rættartrygd okkara er sostatt ikki petti frægari enn í londum uttan fólkaræði.

Amerikanska fólkið hevur okkara fullu samkenslu eftir herviligu yvirgangsatsøknirnar 11. september 2001. Álopini á USA eru framd í blindum hatri. Illgerðafólkini aftanfyri meiningsleysa hópmorðið eru grundleggjandi sjúk. Talan er um nøkur fólk, sum tvørtur um landamørk hava mannað ein bólk, ið einans hevur sum endamál at fremja skipaðan yvirgang. Hesi fólk brúka víðgongar átrúnarligar tulkingar til tess at rættvísgera sínar brotsgerðir. Líkt er til, at høvuðsætlan teirra er at fáa kríggj í lag millum vesturlendska og muslimska heimin. Sostatt er heimsfriðurin í veruligum vanda, tí eydnast ætlan teirra er 3. heimsbardagi byrjaður, ið fer at fáa ræðuligar fylgjur fyri okkum øll.

**Lat okkum ikki leggja ilt afturat illum**

Søgan lærir okkum, at harðskapur sjáldan elvir til nakað gott, og tí er tað týdningarmikið, at USA ikki leypur framav í berum snarsinni. At gjørt hetta hevði bara elvt til meira harðskap, tí hevnd elvir til nýggja hevnissøku, og við hesum fáa brotsmenninir júst tað teir vilja hava — kríggj. Rættasta loysnin er, at allar heimsins tjóðir, ið virka fyri friði og fólkaræði, í felag arbeiða fyri at fáa hendur á brotsmonnum, og seta teir frammanfyri ein altjóða dómstól. Her skuldu Sameindu Tjóðir (ST) sloppið at staðið sína roynd, soleiðis at eingin tjóð einsamøll trein fram á pallin og spældi heimsins løgregla. Eisini eigur altjóða samfelagið í størri mun at byrgja fyri, at tílíkur harðskapur fær gróðrarlíkindi. Og hetta verður ikki gjørt við kúlum og kanónum.

**Okkara lutur í heiminum**

Øll hava vit ábyrgdina fyri heiminum, vit búgva í. Heimsfriðurin er treytaður av, at allar heimsins tjóðir miðvíst arbeiða fyri at fáa umstøðurnar hjá fólki í rætt lag. Saman eiga vit at tryggja, at eingin tílíkur hatur fær gróðrarlíkindi. Føroya fólk eigur miðvíst at stríðast fyri frælsi og fólkaræði. Eisini skal tjóðin taka ein virknan leiklut í tilbúgvingum, ið hava til endamáls at basa skipaðum yvirgangi.

**Heimastýrið - eitt kustaskáp hjá yvirvaldinum**

Tá hugt verður at, hvussu okkara viðurskiftir í løtuni eru skipaði í heimastýrinum, sær ikki tespiligt út. Fólkið hevur hvørki ávirkan á ella innlit í, hvussu okkara uttanríkis- og trygdarpolitisku mál verða viðgjørd. Tjóðin hevur einki umboð millum heimsins tjóðir, føroyska røddin verður ongastaðni hoyrd og Føroya fólk hevur onga ávirkan - nakrastaðni. Yvirvaldið hevur, uttan at spyrja nakran eftir, tikið sær rættin at umboða føroysku tjóðina.

Hetta er grundleggjandi í stríð við fólkaræði. Føroya fólk hevur ikki valt hesi umboð, tey skilja enn ikki føroyska málið, hava onki innlit í okkara mentan og eru tískil ikki skikkaði at umboða føroyska tjóðina. Ríkisumboðið situr sum ein annar talibanur og dikterar ríkisins vegna í hesum málum. Og hetta er ikki at spæla við. Óhugnaligt er at síggja, hvussu yvirvaldið hevur tíggjað sær í eitt nú Thule-málinum — uttan at standa nøkrum til svars. Hetta er enn eitt syrgiligt dømi um, at heimastýrini bæði ikki eru annað enn eitt kustaskáp, sum yvirvaldið — av og á — brúkar til tess, at spæla heimsveldi.

**Mannagongdir í heiminum**

Flestu heimsins tjóðir hava ásettar reglur, ið nágreiniliga lýsa, hvørjar mannagongdir skulu fylgjast, tá altjóða kreppur kykna upp. Oftast er mannagongdin tann, at eitt kreppuráð við hægstu politisku og herðnaðarligu umboðunum beinanvegin verður savnað. Málið verður viðgjørt og tilbúgvingarætlanir settar í verk. Í nógvum førum verður trygdarstøðið hækkað. Eftir hetta verður fólkið kunnað. Síðan er vanligt, at lívligt alment kjak er. Fjølmiðlar, politiskir flokkar, áhugabólkar og onnur taka lut í orðaskiftinum. Prátið á gøtuni fellur oftani eisini á hetta sama.

**Munnkurv í heimastýrinum**

Tá hugt verður at, hvørja viðgerð og umtalu álopini á USA 11. september hava fingið í heimastýrinum, má ásannast, at lítið bendir á, at okkara fólkaræði stendur í besta blóma. Ríkisumboðið hevur, sum Bispur á sinni, fingið munnkurv frá stjórnini og føroyski almenningurin verður sostatt als ikki kunnaður um nakað. Gamaní hevur Landsstýrið roynt at sýna góðan atburð við at lýsa almennan sorgardag sjálvan 14. Eisini hevur Løgmaður, sum frægast, roynt at greitt frá, hvønn leiklut tjóðin eigur at átaka sær í tílíkum kreppum. Tó má ásannast, at eisini hansara leiklutur undir verandi skipan er ógvuliga avmarkaður.

Síðan hevur ræðandi lítið verið at frætta. Eingin politiskur flokkur hevur

*Framhald á síðu 9*


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:** Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

Veljarakanningin: ein klokkuklárur dómur

# - móti fullveldisætlanini hjá landsstýrinum - fyri víðkaðum sjálvstýri í ríkisfelagskapinum

**Hans Pauli Strøm,**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Tað var neyðarsligt í at hoyra teir báðar løgmann og hansara vara- royna at gera veljarakanningina til onkis, sum í veruleikanum var ein rungandi staðfesting av teirra politisku fiasko í fullveldismálinum.

**Bara helvtin av fólkafloksveljarunum siga Ja til fullveldisætlanina**

Tað teir báðir søgdu var, at fólkið hevur ikki skil fyri hesum spurningunum, og at tey svara í eystur, tá tey verða spurd í vestur. Í síni sjóforkláring í útvarpinum segði løgmaður m.a., at veljararnar, serliga fólkafloksveljararnar, kunnu halda tað, at fullveldisætlanin hjá landsstýrinum er ein skipan innan fyri ríkisfelagsskapin, tí hon gongur jú út uppá at fremja yvirtøkur og soleiðis "tøma heimastýrislógina" og so bla. bla. bla. Tað sum Anfinn í roynd og veru segði var, at fólk, serliga fólkafloksfólk, eru eitt sindur býtt og havi ikki forstaðið hvat henda "prosessin" hja Anfinn & Co. gongur út uppá. Og tí siga tey nei til fullveldið og ja til rikisfelagsskapin, sjálvt um tey áttu at sagt øvugt.

**Eins og løgmaður heldur eisini vara-, at veljararnir eru býttir**

Hin fýrurin, varaløgmaður, var ikki stórt mætari. Hansara sjóforkláring í sjónvarpinum var eins og hjá løgmanni ein niðurgering av andsevnunum hjá veljarunum: hann helt ikki teir vistu hvat "víðkað sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin", var fyri nakað. Ja, so skítbýttir eru veljararnir eftir hugsan Høgna, at sjálvt um tað var skorið út í papp í spurninginum, at hetta sjálvstýri er "undir danskari grundlóg", ja, so skilja teir framvegis ikki petti av, hvat talan er um. Og tí svara tey bara sum best ber til.

**Fimti hvør tjóðveldisveljari segði Ja til danska grundlóg**

Høgni vildi vera við, at tað vóru so nógvir tjóðveldisveljarar (12%) sum søgdu Nei til fullveldisætlanina, tí teir halda hon er ikki nóg víðgongd. Tað hevði verið stuttligt at hoyrt hann forklára, hví so nógvir tjóðveldisveljarar (21%) søgdu Ja til "víðkað sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin og undir danskari grundlóg"?

**Táið berini eru súr...**

Varaløgmaður helt hánt um hesar veljarakanningarnar. Viðhvørt vendi tað ein veg og næstu ferð vendi tað so hinvegin. Altso, tað er onki skil í, hvørki hjá teimum sum spyrja, ella hjá teimum sum svara. Annars tók hann eini ósannindi uppaftur hesaferð, sum hann hevur havt frammi fyrr: at tað er aðruhvørja ferð at meiriluti er fyri fullveldinum, og aðruhvørja fer meiriluti fyri ríkisfelagsskapinum. Hetta passar ikki. Tað hevur eina (1) ferð verið greiður meiriluti fyri fullveldisætlanini. Tað var við allarfyrstu veljarakanningina fyri 3 árum síðani. Við allar tær síðstu veljarakanningarnar hevur sjálvstýrisalternativið í ríkisfelagsskapinum ligið omaná.

Sí talvu 1 og stabbamyndirnar!

**Veljarakanningin talar klokkuklárt**

Bæði løgmaðúr og varakunnu spara sær sítt uttanumtos. Tað ber als ikki til at grugga boðskapin í veljarakanningini, tí hon er so klokkuklár, sum tað yvirhøvur ber til. Tað eru tveir spurningar um ríkisrættarligu støðuna. Annar um fullveldisætlanina. Hin um víðkað sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum. Hesir spurningar eru beinleiðis treytaðir av hvørjum øðrum: er svarið Ja til tann fyrsta, skal tað verða Nei til tann næsta. Og hetta síggja vit eisini aftur í svarinum í veljarakanningini (talva 1 og myndirnar báðar): tað er so at siga fullkomið samsvar millum úrslitið av spurningi 1 (53% svara Nei til fullveldisætlanina) og spurningi 2 (54% svara Ja til sjálvstýri í ríkisfelagsskapi).

**Talva 1. Alternativini í veljarakanningini til ríkisrættarligu støðuna**

| | Ja | Nei | Veit ikki | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| Fullveldisætlanin hjá landsstýrinum | 38 | 53 | 9 | 100 |
| Víðkað sjálvstýri í ríkisfelagsskapi | 54 | 35 | 11 | 100 |

**Talva 2. Fullveldisætlanin hjá landsstýrinum**

| | Ja | Nei | Veit ikki | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| Samgonguveljarar | 69 | 21 | 10 | 100 |
| Andstøðuveljarar | 10 | 83 | 8 | 100 |
| Úr øllum flokkum | 38 | 53 | 9 | 100 |

**Talva 3. Víðkað sjálvstýri í ríkisfelagsskapi**

| | Ja | Nei | Veit ikki | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| Samgonguveljarar | 32 | 55 | 12 | 100 |
| Andstøðuveljarar | 75 | 16 | 10 | 100 |
| Úr øllum flokkum | 54 | 35 | 11 | 100 |







*Myndirnar vísa ikki "veit ikki", tí at talið er javnstórt í báðum spurningum og bæði hjá samgongu- og andstøðuveljarum*

**Triði hvør samgonguveljari sigur Ja til sjálvstýri í ríkisfelagsskapi**

Eitt er, at andstøðan hevur fingið meiriluta í veljarakanningini, 52%, móti 48% til samgonguna. Men høvuðsorsøkin til, at fullveldisætlanin verður kolldømd so dyggiliga, er at so nógvir samgonguveljarar venda henni bakið og taka sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin framum. Hetta sæst týðiligt av Talvu 2 og 3. Hjá andstøðuveljarunum er støðan greið. So er ikki hjá samgonguveljarunum: 21% av teimum siga Nei til fullveldisætlanina. Og heili 32% av teimum siga Ja til víðkað sjálvstýri í ríkisfelagsskapi.

Sí talvu 2 og 3!

Hetta er veruligi trupulleikin hjá landsstýrissamgonguni: Hennara avgjørda aðalmál, fullveldisætlanin, er dottið sundur innanífrá! Fólk taka nú eina alternativa sjálvstýrisskipan í ríkisfelagsskapinum framum. Stór ábyrgd liggur tí á andstøðuflokkunum, enn betur enn higartil at lýsa støðu teirra til, hvussu vit vilja skipa viðurskiftini millum Føroyar og Danmark av nýggjum, m.a. við eini nýggjari sjálvstýrislóg í staðin fyri heimastýrislógina, ið tryggjar tjóðarstøðu Føroya í ríkisfelagsskapinum sum javnbjóðis og sjálvstýrandi land.

*Framhald av síðu 8*

boða frá sínari støðu til málið, eiheldur hava nógvir áhugabólkar gjørt vart við seg. Fáir serfrøðingar hava gjørt viðmerkingar, og viðgerðin av kreppuni, á einum kritiskum støði, hevur verið ógvuliga soltin. Og einki alment orðaskifti hevur verið yvirhøvur. Heldur ikki hava fólk sýnt málinum serliga stóran áhuga.

**Okkara ábyrgd**

Tað má sigast, at yvirgangsatsøknirnar á USA 11. september hava sett djúp spor. Nógv bendir á, at kreppan fer at vara leingi og fáa rættiliga umfatandi fylgjur. Vónandi fer eitt miðvíst samhaldsfesti millum heimsins tjóðar at hava við sær, at yvirgangsmenninir verða settir framman fyri ein altjóða dómstól. Og hesum eiga føroyingar eisini at virka fyri. Føroya fólk eiga at taka ein virknan leiklut í strembanini fyri frælsi og fólkaræði. Føroyska tjóðin kann ikki duffa sær í heimastýrinum. Vit skulu kennast við okkara rættindi og skyldur — bæði heima og úti í heimi.

## Rætting

Í eini viðmerking frá Landsfelag Handverkaranna, sum var í blaðnum í farnu viku, var skeiv yvirskrift komin at standa yvir viðmerkingini.

Rætta yvirskriftin skuldi vera »Er Karsten Hansen í lummanum hjá Føroya Handverksmeistarafelag?«

Vit biðja um umbering fyri mistakið.

**Blaðst.**